

Fakfelagsleiðarin í Safe, Hilde-Marit Rysst. Mynd: Safe

# Framtíðin er kolasvørt hja oljuvinnuni

**Jógvan Hugo Gardar**

01.10.2015 - 11:31

Oljan.fo

Lági oljuprísurin er av álvara við at fáa fastatøkur í Noregi. 11 boripallar kunnu vera uttan uppgávur tá jólini koma, harafturat eru tað 12 boripallar sum hava avtalur sum ganga út í 2016. Tað merkir at 5000 størv í hesum partinum av vinnuni kunnu hvørva.

Sturla Henriksen, stjóri í norska reiðarafelagnum sigur við Stavanger Aftenblad at støðan á oljumarknaðinum nú rakar norsku vinnuna hart.

- Støðan er trupul, og hon gerst truplari komandi mánaðirnar. Soleiðis sum vit duga at lesa tað í dag, so kemur støðan bara at versna, sigur Henriksen.

Umframt at 23 boripallar kunnu vera arbeiðsleysir komandi heyst, so kann talið a veitingarskipum sum ikki hava nakað at gera tvífaldast frá í dag til minst 78 skip tá vit fara at halda jól i ár.

Fakfelagsleiðarin í Safe, Hilde-Marit Rysst, sigur at tíverri er støðan kolasvørt hja vinnuni. Hon sigur at tey vanliga siga at tað eru knýtt millum 200 og 220 størv til ein boripall, og við 23 boripallum uttan uppgávur, so eru 5000 fólk í vanda fyri at gerast arbeiðsleys.

Rysste sigur at neyðugt er at norska stjórnin setur í gongd tiltøk sum kunnu tryggja at oljuvinnan sleppur at gera uppgávur nú sum kunnu tryggja at so nógv sum gjørligt hava uppgávur komandi tíðina. Talan kann vera um bæði at gera viðlíkahald og at seta nøgl í oljubrunnar sum ikki eru i bruk, sokalla "brønnplugging".

- Harafturat er neyðugt at stjórnin setur í gongd arbeiði við at bjoða út nýggj leitiøkir, sigur Rysst, sambært Stavanger Aftenblad